Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 28. februar 2024
Mál nr.: 23/18675
Málsviðgjørt: JEK

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 68 frá 9. juni 1988 um trygdargrunn fyri avreiðingar og lønir v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 9. mars 2023, verður § 9, stk. 1 orðað soleiðis:
Grunnurin verður umsitin av Toll- og Skattstovu Føroya. Avgerðir ráðsins kunnu innan 4 vikur skjótast inn fyri kærunevnd Trygdargrunsins. Kærunevnd trygdargrunsins hevur 3 limir, ein umboðandi løntakarar, ein umboðandi arbeiðsgevarar og ein formaður. Limirnir í kærunevndini verða valdir av landsstýrismanninum fyri 4 ár í senn. Samstundis verða vald varafólk, sum taka sæti í kærunevndini, tá limi berst frá.	"Grunnurin verður umsitin av TAKS. Avgerðir, sum TAKS tekur, kunnu innan 4 vikur eftir at kærarin hevur fingið fráboðan um avgerðina, kærast til Føroya Kærustovn."